# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 08-03-33-27 | Lóg: Meirvirðisgjaldslógin § 7 | Avgerð tikin: 07.12.2009 |
|---|---|---|

## Afturrindan av mvg av skrásetingargjaldi og uppafturtøka


**Samandráttur:**

**Kært varð um, at TAKS sýtti at afturrinda mvg av skrásetingargjaldi av akfari, sum kærari hevur keypt frá bilasøluni Sp/f Eyðbjørn Hansen. Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørdi, at kærarin kundi seta fram afturgjaldskrav beinleiðis ímóti TAKS, tí tað ikki er gjørligt at seta kravið fram ímóti Sp/f Eyðbjørn Hansen ella Sp/f Berg Motors, sum hevur yvirtikið ognirnar í Sp/f Eyðbjørn Hansen.**


### Avgerð

**Kært er um**, at TAKS hevur sýtt at afturrinda mvg av skrásetingargjøldum av akfari, sum kærari hevur keypt 22. juni 2004 frá bilasøluni Sp/f Eyðbjørn Hansen.

**TAKS** vísir á, at tað er ikki TAKS, ið hevur uppkravt mvg'ið av skrásetingargjaldinum fyri umtalaðu bilar. Tað eru harafturímóti bilasølurnar, ið hava uppkravt mvg'ið í sambandi við sølu og skráseting av omanfyri nevndu bilum.

Tey meirvirðisgjaldsskrásettu virkini (bilasølurnar), skulu avrokna tað uppkravda mvg'ið við TAKS. Víst verður í hesum sambandi generelt til løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum.

Um tey meirvirðisgjaldsskrásettu virkini hinvegin hava inngoldið ov nógv meirvirðisgjald, verður hetta afturgoldið teim meirvirðisgjaldsskrásettu virkjunum eftir reglunum í § 24 í meirvirðisgjaldslógini.

TAKS er av tí áskoðan, at afturgjalding av mvg bert kann koma upp á tal eftir reglunum í § 24 í meirvirðisgjaldslógini, tað er afturgjald frá TAKS til meirvirðisgjaldsskrásett virki.

TAKS metir ikki, at ein ikki skrásettur persónur kann krevja TAKS eftir møguliga ov nógv goldnum mvg, sum persónurin hevur goldið til meirvirðisgjaldsskrásett virki.

TAKS hevur ikki tær ítøkiligu upplýsingarnar um ta goldna mvg'ið av skrásetingargjaldinum, tá tað snýr seg um sølu millum bilasølur og teirra viðskiftafólk. Tey meirvirðisgjaldsskrásettu virkini avrokna tað samlað keyps- og sølumeirvirðisgjaldið til TAKS.

Í teimum førum, har meirvirðisgjaldsskrásettar fyritøkur (bilasølur) hava kravt ov nógv mvg frá teirra viðskiftafólkum, er hetta tí altíð ein spurningur millum bilasøluna og teirra viðskiftafólk. Í øðrum lagi er ein broyting av sølu-mvg'num hjá skrásettari fyritøku (bilasølu) ein spurningur millum TAKS og ta skrásettu fyritøkuna eftir reglunum í § 24 í meirvirðisgjaldslógini.

TAKS er av tí áskoðan, at TAKS ikki skal útgjalda eitt møguliga ov nógv goldið mvg uttan um meirvirðisgjaldsskrásettu fyritøkuna, ið hevur uppkravt mvg'ið.

TAKS fer vísandi til omanfyri standandi ikki at endurrinda mvg'ið av skrásetingargjaldinum fyri omanfyri nevnda bil, vísandi til, at TAKS hevur ikki uppkravt mvg'ið fyri bilin. Tað er meirvirðisgjaldsskrásett virki, ið hevur uppkravt umtalaða mvg'ið, og tí má kærarin fáa hesi viðurskifti í rættlag við meirvirðisgjaldsskrásetta virki.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin** tekur tann 10. desember 2008 avgerð um ikki at geva kæraranum viðhald í afturgjaldskravinum móti TAKS, tí kærarin ikki hevur gjørt sannlíkt, at tað er ómøguligt at seta krav móti bilhandlaranum um afturgjald av ov nógv goldnum mvg av skrásetingargjøldum í samband við skrásetingina av akfarinum.

**Kæruumboðið** heitir í brævi frá 8. januar 2009 á Skatta- og avgjaldskærunevndina um at taka uppaftur nevnda mál, av tí at felagið Sp/f Eyðbjørn Hansen, har bilurin varð keyptur, er tikið av og strikað, og tí hevur kærarin ongan møguleika fyri at krevja aftur mvg-gjaldið av skrásetingargjaldinum frá hesum felag. Hjálagt er skjalaprógvan frá Skráseting Føroya fyri, at felagið er avtikið tann 23. januar 2007.

**TAKS** viðmerkir í brævi frá 22. apríl 2009, at TAKS ikki metir nakað nýtt vera komið fram sum kann grunda, at málið verður tikið uppaftur. TAKS vísir eisini á, at tað ikki greitt framgongur av § 7, stk. 2, litra a í meirvirðisgjaldslógini, at mvg ikki skal rindast av skrásetingargjaldinum. Tað er einans í viðmerkingunum til meirvirðisgjaldslógina, at hetta verður umrøtt.

TAKS vísir í hesum sambandi á, at løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 23. apríl 1999, heimilar, at mvg skal rindast av skrásetingargjaldinum. Í apríl mánaði 1999 samtykti Løgtingið broyting í skrásetingargjaldslógini. Í viðmerkingunum til hesa broyting verður sagt, at endamálið við broytingini er at gera reglurnar lættari at umsita. Í uppskotinum er greitt neyvt frá, hvussu skrásetingargjald og meirvirðisgjald skal roknast, og at broytingar ikki hava við sær meira ella minni inntøkur til landskassan. Roknidømi eru løgd við uppskotinum, ið neyvt vísa, hvat skal gjaldast til landskassan í meirvirðisgjaldi og skrásetingargjaldi.

TAKS metir tað vera púra greitt, hvussu høgt gjald løgtingsfólk á vári 1999 hava atkvøtt fyri at leggja á bilakeyp. Somuleiðis hevur hetta eisini verið greitt bæði fyri bilasøluna og teimum borgarum, ið keyptu sær bil.

TAKS metir tí ikki, at Skatta- og avgjaldskærunevndin kann grunda eina møguliga avgerð ímóti TAKS á viðmerkingarnar til meirvirðisgjaldslógina, eftirsum tað av viðmerkingunum til skrásetingargjaldslógina framgongur, at mvg skal rindast av skrásetingargjaldinum.

Verður viðmerkingin til lóg tulkað mótvegis viðmerking til lóg førir ein lex posterior tulking til, at viðmerkingarnar til skrásetingargjaldslógina skulu ganga framum viðmerkingarnar til meirvirðisgjaldslógina.

TAKS skal at enda vísa á, at tað eisini snýr seg um eina rættarsiðvenju, tí rindan av meirvirðisgjaldi av skrásetingargjaldi hevur verið fylgd vanliga, støðugt og leingi, og hava øll hildið, at ein hevði rættarliga skyldu til tað.

TAKS mælir nevndini til ikki at taka málið upp aftur.

**Kæruumboðið** førir fram í brævi frá 18. mai 2009, at einki løgfrøðiligt grundarlag er undir teimum sjónarmiðum, sum TAKS førir fram og vísir í hesum sambandi til mál, sum fyrr hava verið viðgjørd av Skatta- og avgjaldskærunevndini. Staðfest er í øðrum málum, at TAKS ikki hevur havt rætt at kravt mvg-gjald av skrásetingargjaldinum, og hesa linju væntar kæruumboðið eisini, at Kærunevndin framhaldandi fer at fylgja.

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini.**

Kæruumboðið heitir í brævi frá 8. januar 2009 á Skatta- og avgjaldskærunevndina um at taka uppaftur nevnda mál, av tí at felagið Sp/f Eyðbjørn Hansen, har bilurin varð keyptur, er tikið av og strikað, og tí hevur kærari ongan møguleika fyri at krevja aftur mvg-gjaldið av skrásetingargjaldinum frá hesum felagi. Hjálagt er skjalaprógvan frá Skráseting Føroya fyri, at felagið er avtikið tann 23. januar 2007.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at taka málið upp aftur, tí nýggjar upplýsingar sostatt eru í málinum, sum kunnu broyta ta avgerð, nevndin áður hevur tikið.**

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur framvegis ta fatan, at heimild var ikki at krevja mvg av skrásetingargjaldi av akførum, sum eru skrásett í tíðarskeiðnum frá 1. mai 1999 til 28. apríl 2005, men ásannar, at meirvirðisgjaldslógin ásetir ikki, at ein keypari av einum akfari kann aftursøkja ov nógv goldið mvg beinleiðis frá avgjaldsmyndugleikanum.

Sum nevnt í avgerðini frá 10. desember 2008 er rætti skuldari í førum, har keypari av akfari hevur goldið ov nógv mvg av skrásetingargjaldi, sambært vanligar obligatiónsrættarligar meginreglur, ivaleyst avvarðandi bilhandlari, sum hinvegin hevur slíkt krav ímóti avgjaldsmyndugleikanum uppgjørt eftir ásetingunum í § 24 í meirvirðisgjaldslógini.

Eins og tað er staðfest í dómi, sum er endurgivin í TFS 2008.388, kunnu frávik frá nevndu meginreglu tó gerast, so keyparin av akfarinum kann aftursøkja ov nógv goldið mvg beinleiðis frá avgjaldsmyndugleikanum, um tað ikki er gjørligt ella er sera trupult at seta kravið fram ímóti bilhandlaranum, eitt nú tí hann er ógjaldførur, er tikin undir trotabúarviðgerð ella líknandi.

Akfarið er keypt frá bilasøluni Sp/f Eyðbjørn Hansen tann 22. juni 2004. Sp/f Eyðbjørn Hansen er ikki til longur.

Sambært tekningarútskrift frá Skráseting Føroya er felagið farið í sjálvbodna likvidatión tann 12. desember 2006 og er strikað tann 23. januar 2007. Felagið er sostatt likviderað.

Tann 25. oktober 2006 tók Skatta- og avgjaldskærunevndin avgerð um, at lógarheimild var ikki at krevja mvg av skrásetingargjaldi.

Tá nevndin tók hesa avgerð, var gjørligt hjá kæraranum at seta krav fram móti Sp/f Eyðbjørn Hansen og seinni móti Sp/f Eyðbjørn Hansen í likvidatión.

Spurnartekin kann tí setast við, um tað hevur týdning fyri, um kærarin nú kann seta krav fram móti TAKS, at hann ikki setti krav fram móti Sp/f Eyðbjørn Hansen og seinni móti Sp/f Eyðbjørn Hansen í likvidatión, tá hann hevði møguleika fyri hesum.

Útgangsstøðið má vera, at tað er støðan, tá kravið verður sett fram, sum er avgerandi fyri, um kravið kann setast móti bilasøluni ella TAKS, og ikki um tað í prinsippinum var gjørligt at seta krav fram móti bilasøluni áðrenn. Tað kann tó ikki avvísast, at kravið kann fella burtur grundað á passivitet, ella at kærarin var illvarin um krav sítt.

Í hesum føri kann kærarin tó ikki metast at hava verið greiður yvir, at krav hansara skuldi rættast ímóti bilasøluni, fyrr enn hann fær avgerðina frá TAKS tann 8. juli 2008, har TAKS vísir kravinum frá sær og eisini vísir á, at kravið eigur at setast móti tí, sum hevur selt bilin, og tá er bilasølan likviderað.

Tann støða, at kærarin ikki áður hevur sett krav fram móti Sp/f Eyðbjørn Hansen ella seinni móti Sp/f Eyðbjørn Hansen í likvidatión, kann tí í hesum føri ikki hava við sær, at kærarin av hesi grund hevur mist rættin at seta krav sítt fram móti TAKS.

Spurningurin er nú, um Sp/f Berg Motors, sum hevur keypt virðini úr Sp/f Eyðbjørn Hansen, í hesum sambandi hevur yvirtikið krav um afturgjald av mvg av skrásetingargjaldi, og kravið hjá kæraranum tí skal setast fram móti Sp/f Berg Motors.

Sambært treytaðum keypssáttmála millum Sp/f Berg Motors og Sp/f Eyðbjørn Hansen, sum er undirskrivaður 9. juni 2004, hevur Sp/f Berg Motors keypt virðini úr Sp/f Eyðbjørn Hansen, herundir umboð fyri bilmerkið Suzuki.

Sambært keypssáttmálanum keypir Sp/f Berg Motors einans virðini úr Sp/f Eyðbjørn Hansen og ikki partabrøvini. Sp/f Berg Motors hevur tí ikki yvirtikið krøv, sum eru móti Sp/f Eyðbjørn Hansen, uttan so at hetta er avtalað millum partarnar. Eingin áseting er í sáttmálanum, sum bendir á, at Sp/f Berg Motors hevur yvirtikið krøv um afturgjald av mvg viðvíkjandi teimum bilum, sum eru keyptir frá Sp/f Eyðbjørn Hansen, og hesi krøv kunnu tískil ikki rættast móti Sp/f Berg Motors.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt, at kærarin kann seta fram afturgjaldskrav beinleiðis ímóti TAKS, tí tað ikki er gjørligt at seta kravið fram ímóti Sp/f Eyðbjørn Hansen ella Sp/f Berg Motors.**

Nevndin kann upplýsa, at krøv um afturgjald av ov nógv goldnum mvg av skrásetingargjaldi fyrnast eftir lov nr. 274 af 22. december 1908, lov om forældelse af visse fordringer (fyrningarlógin frá 1908). Fyrningarfreistin er 5 ár.

Er freistin farin, kann skuldarin avvísa kravið vegna fyrning. Skuldarin kann tó eisini velja ikki at gera fyrningina galdandi og ímøtikoma kravinum.

Tað er sostatt TAKS, sum í fyrstu atløgu tekur avgerð, um kravið er fyrnað, og um TAKS, um so er at kravið er fyrnað, ger fyrningina galdandi.